VIÐMERKINGAR

# Partarnir á arbeiðsmarknaðinum: Hava tikið okkum av eini samfelagsuppgávu


Ingeborg Vinther


Vilhelm M. Johannesen

TÍÐINDASKRIV
*frá Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag*

Nú røddir hava verið frammi í bløðunum og viðgera Arbeiðsloysisskipanina og støðuna hjá skipanini í almennum samanhangi, halda feløgini sum umboða tímaløntar arbeiðstakarar og privatu arbeiðsgevarirnar, tað vera neyðugt at gera nakrar viðmerkingar til málið og greina støðu sína alment.

**Forsøgan og stovnan av Arbeiðsloysisskipanini**

Tað var í 1991, at landsstýrið setti eina nevnd at gera kanningar viðvíkjandi einari møguligari arbeiðsloysistrygging í Føroyum. Nevndin legði fram uppskot sítt í desember 1991, sum saman við eini frágreiðing og uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Nevndin var samd um at skjóta upp, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fingu fulla ábyrgd av skipanini soleiðis at skilja, at teir ikki bert høvdu ábyrgd av umsiting av skipanini, men eisini av at útvega neyðuga peningin. Lagt varð afturat í frágreiðingini, at um so er, at pengar koma at vanta í, skuldi tað vera upp til partarnar á arbeiðsmarknaðinum sjálvar at krevja tann pening inn, sum restaði í. Víðari verður sagt í frágreiðingini, at skipanin verður ikki bert bíligari fyri samfelagið sum so, men eisini fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, ið, um skipanin var almenn, eisini høvdu verið noyddir at goldið hana um skatt og toll.

Eitt annað sjónarmið, sum nevndin hevði, var, at tað skuldi verða upp til tann einstaka borgaran at taka avgerð um, hvørt hann lat seg tryggja ella ikki. Tað vísti seg kortini, at so stórur ivi var um, hvørt tað var møguligt at fáa eina frívilliga skipan, sum kom at fáa nóg mikið av inntøkum, orsakað av at bert arbeiðsleys og onnur við ótryggum arbeiði fóru at gerast limir. Tað var tí neyðugt, at skipanin gjørdist tvingað. Hetta førdi so aftur við sær, at neyðugt var at løggeva um skipanina.

Tá landsstýrið legði fram uppskot fyri tingið um løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, varð m.a. sagt í viðmerkingunum, at „tá tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava gjørt uppskotið, so er í veruleikanum talan um eina semju, sum gjørd er". Víðari verður sagt í viðmerkingunum „skotið verður upp, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum koma at fáa fulla umsitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av skipanini".

Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at „landskassans leiklutur verður sostatt, umframt 20 mió. kr.-gjaldið, bert at gjalda sum arbeiðsgevari. Landið eigur bert at luttaka í tann mun, landið sjálvt er arbeiðsgevari".

Tær 20 mió. kr., sum landsstýrið rindaði inn til skipanina, vóru ætlaðar sum eitt íkast til stovnsfæið. Somuleiðis varð gjørt av, at Arbeiðsloysisskipanin ikki skuldi fara at gjalda út fyrrenn nóg mikið av peningi var savnaður við inngjøldum. Í tíðarskeiðinum fram til 1. august 1992, tá skipanin byrjaði at rinda út, vóru uml. 60 mió. savnaðar í stovnsfæi, harav 2/3 stavaðu frá inngjøldum frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Tá skipanin varð sett í verk við løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992, var tað eisini greitt, at ætlanin hjá nevndini og endamálið hjá landsstýrinum var góðkent av løgtinginum. Sambært lógini skuldi landskassin lata 20 mió. kr. sum stovnsfæ til Arbeiðsloysistryggingina sum eingangsgjald, meðan fíggingin av skipanini annars lá á pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, og leiðslan skuldi liggja hjá einum stýri við 7 limum, sum vórðu valdir av landsstýrinum, men soleiðis, at teir skulu umboða løntakarafeløgini og arbeiðsgevararnar. 1 limur skuldi umboða hitt almenna sum arbeiðsgevari. Avgerðir um tryggingarútgjald og mál um arbeiðsávísing skuldu ikki kærast til landsstýrið, men til eina kærunevnd, hvørs limir eisini vóru ásettir í lógini sum umboðandi løntakarar og arbeiðsgevarar, meðan triði limurin, formaðurin, skuldi vera løgfrøðingur.

Landsstýrið skuldi í kunngerð áseta nærri reglur um innkrevjing av gjaldinum og eftir tilmæli frá stýrinum fyri Arbeiðsloysistryggingina reglur um útgjald.

**Kreppan í nítiárunum**

Tá búskaparkreppan tók seg upp í 1992, var Arbeiðsloysisskipanin fleiri ferðir um at kollsigla fíggjarliga. Tað var skjótt, at tær 60 mió. kr. vóru brúktar, og tá Arbeiðsloysisskipanini tørvaði meiri pening, fekk hon loyvi at taka lán úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Í 1995 fekk Arbeiðsloysisskipanin harumframt játtaðar 50 mió. kr. frá løgtinginum í sambandi við, at mest loyvda útgjaldstíðarskeiðið varð longt orsakað av tí stóra arbeiðsloysinum. Á henda hátt slapp tað almenna undan einari øgvusligari øking av almannaútreiðslum til m.a. forsorgarhjálp.

Hóast munandi broytingar vórðu gjørdar í skipanina við løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997, vórðu ongar grundleggjandi broytingar gjørdar í skipanini, sum framhaldandi skuldi vera rikin av umboðum fyri arbeiðsmarknaðin.

**Er ALS partur av almennu umsitingini?**

Ætlanin er ikki at fara út í alment kjak um lógargrundarlagið undir Arbeiðsloysisskipanini ella løgfrøðiligar metingar um, hvørt skipanin er almenn ella ikki. Tað, sum er avgerandi fyri nevndina er, at Arbeiðsloysisskipanin, nú hon hevur virkað í 10 ár og hevur yvirlivað størstu búskaparkreppu í nútíðar føroyskari søgu og síðani tá konsolideráð seg fíggjarliga, framhaldandi fær frið at virka uttan politiska uppílegging og uttan at gerast partapolitiskt kjakevni. Tað kann bert skaða Arbeiðsloysisskipanina, um hon gerst ein partur av árliga fíggjarlógarorðaskiftinum flokkanna millum. Tað er ikki lætt at síggja, at tað skal vera møguligt at áseta inntøkur og útreiðslur hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri eitt ár fram í tíðina. Tað veldst alt um, hvussu støðan er á arbeiðsmarknaðinum.

Ført verður fram, at av tí, at landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, at fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit eru galdandi fyri Arbeiðsloysisskipanin, fylgir av tí, at hon er ein almennur myndugleiki.

Hetta er ein misskiljing. Sambært § 1 í fyrisitingarlógini og lóg um alment innlit, ið báðar eru so gott sum einsljóðandi, kann fyrisitingarlóggávan umframt at vera galdandi fyri almennu fyrisitinginga, eisini vera galdandi fyri nærri ásett feløg, stovnar og felagsskapir (§ 1, stk. 3). Hetta er tó bert galdandi, um annaðhvørt útreiðslurnar av virkseminum hjá hesum stovnum í høvuðsheitum verða rindaðar av landi ella kommunu ella í tann mun tey við ella sambært lóg hava fingið heimild til at taka avgerð vegna land ella kommunu.

Tað ber sostatt væl til at halda, at nevnda lóggáva er galdandi fyri ALS, hóast ALS ikki er ein partur av almennu fyrisitingini. Tað er júst henda støða, ið er galdandi fyri ALS, sum í ávísan mun hevur heimild at regulera sítt virksemi við kunngerðum innanfyri lógarkarmin.

Víðari verður sagt, at tá tað stendur í § 9 í ALS-lógini, at ALS-gjaldið kann krevjast inn við panting, fylgir av einari lóg frá 1935 og einari kunngerð frá 1936 um vegleiðing fyri pantifútar, at ALS er almennur stovnur, av tí at panting bert kann fremjast fyri skatt og onnur avgjøld til tað almenna. Harav skal so fylgja, at ALS-gjaldið má vera ein skattur ella eitt avgjald til tað almenna.

Hetta er eisini ein misskiljing. Tað, sum veruliga stendur í vegleiðingini frá 1936 fyri pantifútar er, at pantifútar bert kunnu gera útpanting fyri skatt ella onnur almenn gjøld. Tað stendur einki um, at aðrir myndugleikar ikki kunnu panta fyri onnur gjøld, ella at pantirættur ikki kann vera fyri onnur gjøld enn skattir og gjøld til tað almenna.

Sum dømi kann nevnast, at í einari lóg frá 1963 um innkrevjing av uppihaldspeningi til børn og einari lóg frá 1996 um barnagjøld til einsamallar uppihaldarar er ásett, at tílík gjøld kunnu krevjast inn við panting. Eingin hevði funnið uppá at sagt, at hesi gjøld eru skattur ella annað gjald til tað almenna.

Síðani verður víst á, at stýrið sambært fleiri greinum í ALS-lógini hevur heimild til at gera kunngerðir um nærri ásett viðurskifti. Hetta verður so við stýriskipanarlógini sum grundarlag lagt út sum, at ALS-stýrið hevur fingið lóggávuvald, og at privatir stovnar koma sostatt ikki at hava lóggávuvald. Harav skal so fylgja, at ALS er ein almennur stovnur.

Hertil er bert at siga, at ALS-stýrið við lógini um Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið heimild og skyldu til at standa fyri rakstrinum av Arbeiðsloysisskipanini, og í hesum sambandi at áseta nærri reglur fyri, hvussu skipanin skal virka. Harafturat hevur ALS-stýrið fingið heimild til innanfyri ávíst í lógini ásett mark at áseta ALS-gjøldini. Hetta er ikki talan um nakra lóggávu, men um nærri regulering av einum virksemi, sum er skipað í lóg, og sum í lógini hevur fingið ógvuliga gjølla ásett, hvat endamál skipanin hevur, hvussu hon skal virka, og hvat hon skal brúka sínar pengar til.

**Samanumtikið**

Í gjøgnum tíggju ár hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum við umboðum teirra í ALS-stýrinum tikið sær av einari samfelagsuppgávu, sum almennir myndugleikar í øllum øðrum londum hava hildið tað verið neyðugt at greiða sum almenna uppgávu. Hesi tíggju árini hava óivað verið tey torførastu í Føroya nýggjastu søgu, tá ræður um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum við methøgum arbeiðsloysi og harav fylgjandi trupulleikum. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum meta, at tað eru teir og limir teirra, sum gjøgnum síni gjøld til skipanina eru veruligu eigarar av skipanini og eru samdir um, at teir ikki fara at góðkenna, at tað almenna nú fer at leggja hendur á peningin hjá skipanini ella taka ræði av skipanini.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Vilhelm M. Johannesen**

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Ingeborg Vinther**



# Tjóðveldislýsing uttan avsendara

*Hetta er lýsingin, sum øll orrustan hevur verið um: Boðskapurin er, at Lisbeth er »hálv donsk« og Jóannes er »hálvur føroyskur«, meðan Høgni Hoydal er »rættur føroyingur«. Hóast Tjóðveldisflokkurin ikki hevur góðkent lýsingina, so hevur lýsingafyritøkan, sum hevur gjørt alla valherferðina hjá Tjóðveldisflokkinum, sett hana í Sosialin. Talan er um eitt mistak, sigur lýsingafyritøkan, sum tekur sær fulla ábyrgd av mistakinum*




**Nógv orrusta hevur verið um lýsing frá Tjóðveldisflokkinum, sum stóð í Sosialinum í gjár. Team 85 hevur gjørt lýsingina og sent Sosialinum hana – men Tjóðveldisflokkurin hevur ikki góðkent hana frammanundan**

VALLÝSING
*Eirikur Lindenskov*

– Tjóðveldisflokkurin hevur hvørki gjørt ella góðkent hesa lýsing, sigur Høgni Hoydal, formðaur Tjóðveldisfloksins um lýsingina, sum stóð á síðu 3 í Sosialinum í gjár.

Lýsingin er frá Tjóðveldisflokkinum, og boðskapurin í henni er, at Lisbeth L. Petersen og Jóannes Eidesgaard ikki eru rættir føroyingar.

Lisbeth er »hálv donsk« og Jóannes er »hálvur føroyskur«, meðan Høgni Hoydal er »rættur føroyingur« – og so hevur hann eisini ein »frælsan fugl« flúgvandi uppi yvir sær, meðan myndirnar av Lisbeth og Jóannesi ávikavist eru settar saman við Anders Fogh Rasmussen og Poul Nyrup Rasmussen.

Tað er lýsingafyritøkan, Team 85, sum hevur gjørt lýsingina og sent Sosialinum hana. Hendan lýsingafyritøkan hevur gjørt allar vallýsingarnar hjá Tjóðveldisflokkinum – og staðið fyri allari valherferðini hjá flokkinum. Vit hava spurt stjóran á Team 85, Johnny Gaard, hvussu tað ber til, at tey lata frá sær eina slíka lýsing.

– Talan er um eitt mistak, sum vit eru ómetaliga kedd av. Nú gera vit fleiri túsund lýsingar um árið, og tær verða ongantíð latnar, fyrr enn kundin hevur góðkent lýsingina frammanundan. Hesaferð er tíverri tað mistak hent, at kundin ikki hevur góðkent lýsingina, sigur Johnny Gaard.

Johnny Gaard veit ikki, hvussu mannagongdin hevur verið millum Team 85 og Tjóðveldisflokkin, ella um Tjóðveldisflokkurin hevur góðkent allar hinar lýsingar, sum Team 85 hevur gjørt. Men tað er sama starvsfólk, sum hevur staðið fyri allar valherferðini hjá Tjóðveldis-flokkinum.

Johnny Gaard sigur, at hann nú fer at kanna, hvussu hendan lýsingin er vorðin til, og hví hon er send Sosialinum, uttan at kundin hevur góðkent hana frammanundan.

– Út frá teirri staðfesting, at kundin ikki hevur góðkent lýsingina, so taka vit okkum fulla ábyrgd av mistakinum. Men hví tað er hent, veit eg ikki, og tað skal eg hava greiðu á, sigur Johnny Gaard.

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins sigur í viðmerking, at flokkurin vendir sær harðliga ímóti innihaldinum í hesi lýsingini.

Barnabiografur á Torginum í SMS:

# – Angela er vertur

BARNABIOGRAFUR
*Tíðindaskriv*

Tað er ikki so ofta, at foreldur kunnu taka børnini við til handils, men hesa vikuna er eitt gott høvi at vitja húsið og hava børnini við. Tí mikudagin 1. mei lata vit nevnliga ein stóran barnabiograf upp á Torginum.

Vit seta upp stórskýggja, har vit fara at sýna nýggjar og spennandi barna- og teknifilmar allan dagin. Mikudagin til fríggjadagin lata vit upp kl. 13.00 og hava opið til handlarnir lata aftur. Leygardagin er biografurin opin frá kl. 10.00-17.00.

Tað er ikki hvør sum helst, sum tekur sær av børnunum hesar dagarnar. Vit hava fingið Angelu, sum flest øll børn í Føroyum kenna, at verða vertur.

Afturat sær hevur hon ein lítlan hjálpara, sum m.a. eisini dugir væl at ganda. Tey bæði vera á Torginum hvønn dag frá tá ið biografurin letur upp og til latið verður aftur á kvøldi.

Minst til: Eingin orsøk er at skunda sær í SMS at hitta Angelu og tey, tí tey eru har allan dagin, heilt frá mikudegnum til leygardagin.

Vit gleða okkum at síggja tykkum!!! ……og bara eitt afturat: Tiltakið er ókeypis, sigur SMS í tíðindaskrivi.

VIÐMERKINGAR

## Veruligt sjálvbjargni

**Roar Heini Olsen**
*Valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoy*



Vit skulu ikki liva av álmussu frá donskum skattgjaldarum, sum sambands- og javnaðarflokkurin vilja ella av avgjaldi frá hernaðarsamgonguni NATO, sum Miðflokkurin við Jenisi á odda heldur uppá.

Tað sum vit skulu liva av eru tey virðir, sum vit sjálvi skapa við okkara egnu hondum. Og føroyingar megna tað sjálvandi væl, um vit leggja gondina so sinniliga til rættis, at vit fyrst tryggja førleika og eitt føroyskt lógargrundarlag, sum ikki er rein umseting av donskum lógum, men er lagað til tørv og umstøður her á landi, búgva okkum til sjálvi at gjalda rokningina, og tá hetta hevur eydnast stendur okkum púra frítt at gera tað, sum halda vera rættast.

Tit, sum kenna meg vita, at eg havi ferðast og búð nógv í útheiminum, harav ein part í menningarlondum. Ongastaðni hevur fólkið so lítið álit á seg sjálvt og ongastaðni er fólkasálin so spilt og viljin til sjálvur at bróta upp um armar so lítil, sum har hjálpin úr útheiminum hevur verið stórst.

Tað hevur gingið alt ov striltið á sjálvstýrisleið síðan heimastýrislógin varð sett í gildi. Hetta hevur Sjálvstýrisflokkurin verið við til at broytt farna valskeið. Gamaní vóru hinir flokkarnir í samgongu ov naivir og trúðu, at danska stjórnin fór at leggja seg skerflatan fyri okkum. Tí gjørdust samráðingarnar eitt heldur óvirðiligt spæl fyri báðar partar, sum vit eftir mínum tykki ikki kunnu líta aftur á við stoltleika.

Men hetta hava flokkarnir nú lært av og allir taka nú undir við tí politikki, sum Sjálvstýrisflokkurin allatíðina hevur trúð uppá og staðið fyri: at fáa fólkasálina við okkum og fyrst at gjalda, síðani at valda.

Tá er mín vón, at føroyingar ikki taka sjálvstýri av haturi til ella nationlum undirlutakenslum yvirfyri Danmark. Tá vit í Sjálvstýrisflokkinum vilja sjálvstýri, so er tað tí vit meta, at hetta veruliga er tað rætta fyri land og fólk. Seinnu helvt av 20. øld gjørdist føroyska tjóðin av álvara ein almannaklientur, og ein slíkur ræður sum kunnugt ikki fyri sínum egnum viðurskiftum og kann heldur ikki gera krav uppá tað.

Tí vilja sjálvstýrisflokkarnir fáa føroysku tjóðini burturúr ta óvirðiligu støðu, sum hon sum stuðulsmóttakari er í og gera vinnulívið og búskapin sjálvberandi, soleiðis at tað ikki er føroyski og danski skattgjaldarin, sum saman fíggja undirskotið hjá føroysku vinnuni, men føroyska vinnan, sum fíggjar tørvin á samfelagsútbyggingar.

Tað eru knúsandi dugnaligir føroyingar bæði heima og allastaðni kring heimin og tá vit noyðast, spíla vit okkum út og noyðast ikki at liggja nøkrum til byrðu.

At gjalda fyri eitt vælferðarsamfelag krevst eitt sunt og sjálvberandi vinnulív, har spardur almennur stuðul m.a. verður nýttur til ráðgeving, gransking og menning - men við munandi størri játtanum enn nú, tí verandi støði tryggjar okkum niðurrykking til 3. División - vinnuliga, samfelagsliga og sosialt.

Setið bert kross við mítt navn og við Sjálvstýrisflokkin, um tit vilja, at veruligir batar skulu henda á hesum økjum.

Brúkið høvdið og veljið við hjartanum!